




## Hergeir Nielsen

*løgtingsformaður*

**Hvussu er at hava summarfrí?**
- Tað er torført at halda frí serligt sum andstøðupolitikari, tí samgongan er dagliga í andstøðu við seg sjálva. Trupulleikar hópa seg upp, og eingin tingmaður við virðing fyri sær sjálvum og sínum sessi fær ella kann kobla heilt úr. Tað er heilt óvanligt, at tað er inni í samgonguni er ein meira virkin samgongan enn tann vanliga andstøðan. Politiska skipanin í Føroyum er farin úr spónalagnum, og landsstýrisfólk brúka tíðina til at skortlýsa seg sjálvi heldur enn virka skilagóðum loysnum.

**Hvat leingist tú eftir í tingarbeiðnum?**
- Eg sakni skilagóðar arbeiðsgongdir og loysnir av málum, sum krevja loysnir. Hóast tað kann verða strævið og tungt at taka avgerðir, so er tað neyðugt, tí annars noyðir onkur, sum kemur aftaná, at gera tað, og tað verður enn verri.

**Hvat brúkar tú frítíðina til?**
- Taki mær av ymsum, sum liggur á láni, tá man er so nógv heimanífrá, sum eg eri. Húsini krevja ábøtur, og nakrir seyðir skulu røkjast.

# Byggja stóran barnagarð

**BARNAGARÐUR**

**Sp/F Kriss-smíð hevur fingið arbeiðið at byggja dagstovn á Fosánesi til 60-70 børn**



Randi Jacobsen

Stýrið í Hvannasunds/Norðdepils kommun samtykti á fundi mánakvøldið at taka av lægsta tilboðnum uppá at byggja barnagarðin í Norðdepli.

Tilboðið uppá 8,6 mió. krónur átti Kriss-smíð. Sáttmálin varð undirskrivaður týsdagin. Hægsta tilboð var 10,3 mió. krónur.

Grivið er út, og økið er planerað, so arbeiðið kann byrja beinanvegin.

Sáttmálin sigur, at barnagarðurin skal verða liðugur í november næsta ár.

Hvannasunds kommuna tekur rivan til við barnagarðinum. Stovnurin, sum skal hava fýra eindir, verður góðar 800 fermetar og skal rúma 60-70 børnum frá pinkuvørnum upp í 10 ára gomul.

Hóast kommunan er barnarík, eru ikki so nógv smábørn har. Í dagrøktini og í frítíðarskúlanum eru samanlagt 55 børn.

- Vit fáa at síggja, hvussu verður við ætlaðu kommunusamanleggingini, og vit hava valt at byggja stovnin, soleiðis at hann kann taka ímóti børnum úr øðrum bygdum eisini, sigur Veronika Petersen, borgarstjóri í Hvannasunds/Norðdepils kommunu.

rando@sosialurin.fo

## Í MORGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, menn kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

## LEYGARDAGIN




Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 16 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 971 hPa. sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing og grynnist spakuliga.




**Komandi nátt:**
Djúpa lágtrýstið vestan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og grynnist eitt sindur.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli – Mánin longst frá jørðini
4. juli – Seinna kvarter
6. juli – Jørðin longst frá sólini
11. juli – Tendring
13. juli – Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. juli | 01:50 | 14:23 | 00:50 | 13:23 | 01:05 | 13:38 | 03:50 | 16:23 | 04:50 | 17:23 | 00:05 | 12:38 | 11:38 | 23:58 | 02:05 | 14:38 | 03:05 | 15:38 | 01:35 | 14:08 | 02:50 | 15:23 |
| 6. juli | 02:43 | 15:03 | 01:43 | 14:03 | 01:58 | 14:18 | 04:43 | 17:03 | 05:43 | 18:03 | 00:58 | 13:18 | - | 12:18 | 02:58 | 15:18 | 03:58 | 16:18 | 02:28 | 14:48 | 03:43 | 16:03 |
| 7. juli | 03:25 | 15:47 | 02:25 | 14:47 | 02:40 | 15:02 | 05:25 | 17:47 | 06:25 | 18:47 | 01:40 | 14:02 | 00:40 | 13:02 | 03:40 | 16:02 | 04:40 | 17:02 | 03:10 | 15:32 | 04:25 | 16:47 |
| 8. juli | 04:11 | 16:36 | 03:11 | 15:36 | 03:26 | 15:51 | 06:11 | 18:36 | 07:11 | 19:36 | 02:26 | 14:51 | 01:26 | 13:51 | 04:26 | 16:51 | 05:26 | 17:51 | 03:56 | 16:21 | 05:11 | 17:36 |
| 9. juli | 05:02 | 17:28 | 04:02 | 16:28 | 04:17 | 16:43 | 07:02 | 19:28 | 08:02 | 20:28 | 03:17 | 15:43 | 02:17 | 14:43 | 05:17 | 17:43 | 06:17 | 18:43 | 04:47 | 17:13 | 06:02 | 18:28 |